# Fáa føroyska mentan

**Børn í Dagstovninum við Landavegin hava fingist nógv við seyð seinastu tíðina og hæddarpunktið var, tá ið tey vóru í Porkeri og flettu**

DAGSTOVNAMENTAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í dagstovninum við Landavegin halda tey, at børnini eiga at uppliva góða, gamla, føroyska mentan.

Í hesum sambandi hava tey fingist nógv við seyð í løtuni.

Tað eru tey 18 børnini í stovuni, tey nevna, Sóljuflog, í dagstovninum, sum hava verið við í projektinum, hetta eru tey børnini, sum fara í skúla næsta ár.

Og í hesum projektinum kann sigast, at tey hava fingið seyð og fletting inn ígjøgnum allar sansir.

Taðavgjørdahæddarpunktið var tá ið tey vóru í Porkeri og flettu fimm lomb.

Men fletting kann verða eitt dramatiskt upplivilsi hjá børnum, sum ikki eru von við slíkt, so áðrenn tey fóru til Suðuroyar, hugdu tey eftir einum filmi um fletting fyri at verða eitt sinur fyrireikað upp á tað, tey skuldu upplivað.

- Men at vera við at fletta seyð var eitt serligt upplivilsi og børnini høvdu ein fantastiskan dag sigur Brynhild Guttesen, pedagogur.

Og tað var eisini øgiligt, tey vóru spent og forvitin.

Fyrsta avbjóðingin kom, tá ið seyðurin skuldi skjótast. Tey flestu hildu seg til, men onkur vildu ikki vera inni, tá ið skotið var.

Onkur annar tordi saktans av vera inni, men tey ætlaðu at halda fyri eyguni. Onkur triði kláraði seg við at halda fyri oyruni, tá ið skotið var.

Soleiðis komu øll snikkaleys ígjøgnum sjálvt drápið, hvør á sín hátt.

Og flettingarmenninir, Jan Poulsen og Hallur Bech vóru undiríktir í spurningin, so hvør sum tummað var og teir fóru at taka innanúr.

Serliga varð dúgliga speuklerað uppá, hvat tað gula mundi vera, sum lá rundan um vombina. Onkur helt tað var spýggja, men onkur annar skeyt upp á at tað var ostur. Men flettingarmenninir vóru raskir og tolnir at greiða frá øllum og at vísa teimum, hvat tað ymsa var.

### Endabrestur

Men børnini hava ikki bara fingist við fletting. Tey hava límað ull upp á lørift, sum bæði kann síggjast og følast og kanska luktast við og tey hava gjørt ymsar prýðislutir úr horni.

Sum rosinan í pylsuendanum, hava tey eisini gjørt ein seyð úr høsnanetið og ull.

- Endamálið hevur verið at læra børn alla tilgongdina frá heilt frá tí at seyðurin verður flettur, til maturin stendur á borðinum, sigur Brynhild Guttesen.

Og tí verður endabresturin í morgin, hósdagin, tá ið tey hava foreldradag, har tey hava framsýning av tí, tey hava gjørt, umframt fáa blóðpannukakur og skerpikjøt og rullupylsu upp á breyð.

Tað ber eisini til vitja www.portal.fo á internetinum, har nógv fleiri myndir liggja undir "Myndafrásagnir".







*Fegin og errin børn eftir lokið verk. Kroviđ er komið á vektina*




*Her verður tikið innan úr og nú eru tey komin til sperðilin*